Í Ll nr. 39, frá 13 mai 2013 um semingsstovn, er ásett í § 7, at ”Partarnir hava skyldu at áseta sínamillum reglur í áhugatrætum, herundir í minsta lagi fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi.” Ti er gjørd niðanfyri standandi semja millum

**Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

**og**

**Føroya Fiskimannafelag**

1. Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.

2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal verða skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum. Roknað verður frá á midnátt.

3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingarnar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er semingsstovnurin komin uppí, ella er semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndum sínum, og hevur boðað frá tí.

5. Hendan avtala kann sigast upp saman við uppsøgnini av sáttmálanum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Tó kann hendan avtalan bara ógildast við nýggjari avtalu.

6. Hendan avtalan fær gildi 1. februar 2015.

Tórshavn, 27. februar 2015

Vegna Reiðarafelagið fyri Farmaskip

Jens Meinhard Rasmussen, formaður

Vegna Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags

Egil Finsson, formaður